## Sponsk Rooney-veiða

Ikki kann sigast annað, enn at 24 ára gamli Manchester United-spælarin, Wayne Rooney, gjørdi góða reklamu fyri sær sjálvum, tá hann leygardagin skjeyt øll málini í 4-0 sigrinum á Hull. Í øllum førum vilja bæði FC Barcelona og Real Madrid hava hann. FC Barcelona skal vera sinnað at rinda 600 milliónir krónur fyri Rooney, meðan Real Madrid sigst vilja fara uppaftur hægri við sínum boði.



## Danmark vann kapping

Danska fótbóltslandsliðið hevur verið á venjingarlegu í Thailandi, har liðið var við í kappingini, Kings Cup. Hesa kapping vann Danmark, sum síðsta sunnudag legði fyri við at vinna 3-1 á Polandi og síðani mikudagin 5-1 á Singapore, áðrenn tað í dystinum ímóti thailendsku vertunum endaði við einum donskum 3-0 sigri. Asia-ferðin hjá landsliðnum var upphiting til HM-endaspælið í summar.

### Dráttur-TB 2-3 (18-25, 21-25, 25-23, 25-23, 9-15)

# Fimmsettari á Giljanesi

**Hóast kvinnurnar hjá TB sóu út til at skula vinna ein sannførandi sigur, kom Dráttur so væl afturíaftur, at fimm sett máttu til, áðrenn TB kundi taka sigurin**




Hilmar Jan Hansen



Marina Popovic, sum her roynir at fáa bóltin fram við blokkinum hjá Drátti, tryggjaði TB sigurin við síðsta bóltinum í fimta setti, sum var eitt servuessi
Mynd: Hilmar Jan Hansen/Einslistir

Eftir fyrstu tvey settini á Giljanesi í gjár var líkt til, at tær báðar tungu finalurnar hjá Drátti í undanfarnu vikuni skuldu kosta. TB, sum eisini vildi »hevna« hálvfinalutapið fyri Drátti í Føroya Banka-kappingini, vann lættliga fyrsta settið og sá út til veruliga at vera til dystin fús.

Dráttur fekk lyft seg eitt sindur upp í øðrum setti, men framvegis var lítil og eingin ivi um, at TB hevði munin. Tó fingu vágakvinnurnar bart seg so mikið væl inn í dystin, at tað var 17-17, áðrenn TB fekk tikið leiðsluna aftur og vunnið settið.

Kortini hevði TB mist eitt sindur av stevinum frá fyrsta setti, og tá Dráttur so mannaði seg enn meira upp, gjørdist dysturin nógv javnari. Eftir tvey tapt sett var tað Dráttur, ið hevði størri yvirskot nú og tók triðja sett.

Góða gongdin hjá heimaliðnum helt fram í fjórða setti, tá Dráttur ímóti endanum kom á odda 19-14. Men so hevði Gudrid Nolsøe nakrar góðar servur, so tað brádliga stóð 19-19. Dráttur kom aftur framum 23-20, men enn eina ferð svaraði TB aftur til 23-23. Hetta sá tó út til at kosta meira hjá TB, ið tordi illa at spæla teir báðar síðstu bóltarnar, og tá so endiliga eitt útjavnandi slag skuldi setast inn, fór tað útum, og so stóð 2-2 í settum.

### TB aftur á slóðina

Fimta og avgerandi setti gjørdist tó ongantíð so javnt og spennandi, tí nú tóku tvørakvinnur, ið haraftrat skuldu hugsa um ikki at gerast ov seinar til Smyril, sær annað skinn um bak. TB fór beinanvegin framum og økti leiðsluna upp í seks stig, áðrenn Dráttur ta einu løtuna nærkaðist eitt lítið sindur, til Marina Popovic at enda avgjørdi setti og dystin við einum servuessi.

Hóast tapið var eitt afturstig í landskappingini, kunnu tær í Drátti neyvan klaga um úrtøkuna farnu vikuna, sum jú gav pláss í steypafinaluni. Hinvegin fekk TB svarað aftur og partvíst staðfest sína støðu sum fremsti avbjóðari hjá SÍ, men helst skal nærlagnið hjá TB hvessast, skulu ikki fleiri óneyðug sett fara til spillis.

Dysturin á Giljanesi í gjár vardi tveir tímar og 10 minuttir, so tey fegnastu mundu vera áskoðararnir, ið eisini vóru frá øðrum enn feløgunum á vøllinum, tí talan var um gott undirhald á vøllinum. Og okkum kunnugt, náddu TB-kvinnurnar kortini Smyril í øllum góðum…

### SÍ-KÍF 3-0 (25-14, 25-11, 25-7)

# Goliat vann á Dávidi

**SÍ-kvinnurnar høvdu ongar trupulleikar av unga KÍF-liðnum, og framvegis eru tær í Sørvági langt á odda í Eik-liguni hjá kvinnum**




Hilmar Jan Hansen

Hóast SÍ ikki hevði sína sterkastu uppstilling á vøllinum, tá KÍF vitjaði í Sørvági í gjár, slepst ikki undan, at hetta var tað, sum í kvinnuflogbólti líkist mest einum dysti millum Dávid og Goliat. Her var munurin bara tann, at tann størri vann á tí minna.

Fáur hevði væntað, at hetta skuldi gerast ein serliga javnur og spennandi dystur, og tað gjørdist hann heldur ikki. SÍ var betur á øllum økjum, og serliga móttøkurnar vóru av tí frægara. Kanska tað partvíst stóðst av, at servutrýstið frá KÍF ikki var tað stóra, men væl lá fyri hjá SÍ.

Onkrir spælarar, ið kanska ikki hava fingið so nógva spælitíð á SÍ-liðnum fyrr í vetur, sluppu at royna seg, og millum annað hevði Lisa Niclasen í øðrum setti eina servurøð, ið gav 11 stig!

KÍF er framvegis í tungum sjógvi, og hóast øll hini eisini tapa fyri SÍ, so tykist onkursvegna lítla framgongdin, ið var at síggja fyri nøkrum dystum síðani, vera eitt sindur fjarari nú. Men tað kanska rættar seg í onkrum av komandi dystum, tá mótstøðan er nakað linari.

SÍ hevur enn fult stigatal fyri sínar 11 dystir, so sjálvt tá stigini verða koyrd niður í helvt eftir næsta dyst, er leiðslan stór. Liðið hevur bara mist trý sett í undanfarnu dystum, so nú fæst at síggja um eina viku, tá SÍ vitjar TB í Trongisvági, um glæsiligu hagtølini síggja líka góð út.